# Gunnvør og Jefri 70 ár



Leygardagin 21. februar halda hjúnini Gunnvør og Jefri Justinussen í Havn 140 ára føðingardag í Pálsstovu við tað at tey verða 70 ár. Jefri fylti 30 september 2008, og Gunnvør fyllir sunnudagin 22. februar.

Gunnvør er úr Havn, og Jefri er leirvíkingur. Gunnvør er dóttir Tinnu, f. Hansen, av Toftum og Sigurd Berghamar úr Havn. Jefri er sonur Minu, f. Vang, úr Kálvhúsinum á Glyvrum, og Absalon Justinussen, vanliga nevndur Absalon á Garði, í Leirvík.

Gunnvør vaks upp við Rættará og seinni flutti familjan í nýggj hús við Dalavegin í Havn. Sum ung arbeiddi hon í skóhandlinum hjá Demmusi og seinni í fleiri ár á Posthúsinum í miðbýnum í Havn.

Gunnvør er sera kreativ og væl liggur fyri at yrkja til veitslur og onnur hátíðarhald í familjuni.

Jefri er sjómaður burturav, hann hevur siglt so at siga alt sítt lív og ger tað enn. Hann fór til skips við sluppini Lizzie, hjá Jógvan Simonsen á Høgabóli, 23. apríl 1953. Í 1959 fór hann á skiparaskúla og tók prógv á sumri í 1960. Hann sigldi sum dekkari við línubátinum Bresti hjá P/F Kimbil frá 1961-63. Frá 1963-72 sigldi hann sum stýrimaður við Beinir hjá sama reiðaríi. Hann sigldi sum stýrimaður við Norðborg hjá P/F Hvalnes frá 1972-88.

Eitt skifti var Jefri arbeiðsformaður á flakavirkinum Frost í Leirvík, frá 1989 til 1993, tá hann fór umborð aftur á Norðborg, har hann er enn. Hann skal ein av fyrstu døgunum til Chile eftir nýggju Norðborg. Eftir meira enn hálva øld á sjónum hevur Jefri upplivað tær ómetaliga stóru broytingarnar frá gomlu sluppunum til nútímans fiskifør við øllum hentleikum.

Gunnvør og Jefri giftist í 1961 og hava búð í Krosslíð síðan 1966. Tey eiga børnini: Absalon, Annika, Sigurð og Tróndur. Barnabørnini eru 7 í tali.

-red

# Sune Hansen seksti



Fríggjadagin 20. februar verður Sune Hansen í Nólsoy seksti. Foreldur Suna vóru Leif Hansen, lærari úr Nólsoy, og Gertrud, fødd Djurhuus, ættað úr Hvalvík. Sune giftist í 1974 Unu, fødd Poulsen, eisini úr Nólsoy og eiga tey børnini Ann-Mari, Leif og Katrin. Abbabørnini eru seks í tali.

Sune fór eftir lokna skúlagongd í heimbygdini til Havnar at læra til snikkara. Tað er eisini sum snikkari og timburmaður, at Sune, við áhuga og dugnaskapi, hevur havt og hevur sítt lívsyrki.

Sune ferðaðist í 70 – og 80 árunum nógv til Havnar at arbeiða, men hevur tey nógvu seinastu árini mest arbeitt í heimbygdini.

Sune arbeiddi eitt skifti sum vitapassari á Borðuni inntil vitin varð automatiseraður miðskeiðis í nítiárunum. Sune arbeiddi eisini nøkur ár sum avgreiðslumaður hjá Stranderðsluni.

Afturat hesum var altíð nógv at takast við í handlinum.

Innan andaliga arbeiði í Nólsoy hava hjúnini Sune og Una havt ómetaligan týdning. Trúðliga hevur Sune røkt starvið sum organistur við Nólsoyar kirkju í samfull 44 ár. Eitt virki, hann í 2005 varð heiðraður fyri við fortjenestesmedalju frá Margretu drotning. Sune hevur, umframt at sitið við urguna í kirkjuni og í missiónshúsinum, eisini sitið í kirkjuráðnum í mong ár – síðani 1993 sum formaður. Mong eru tey, sum í kirkju- og missiónsørindum hava verið á gátt hjá Suna og Unu.

Umframt stóra áhugan fyri kirkjuligum spurningum, hevur Sune havt alstóran áhuga fyri kórsangi og var eisini ein av teimum, ið stovnaði kór í bygdini.

Nú Sune rundar tey seksti verður ynskt honum hjartaliga til lukku við degnum.

J.

# 005 spælir til grýludans

Ikki bara á Sandoynni, men eisini í Suðuroynni, verður hildið fast við siðvenjuna at hava dans føstulávintsmánakvøld.

Í Vági verður grýludansur í VB-Húsinum mánakvøldið. Ljótasta, vakrasta og kreativasta grýla fáa vinning. Tað er bólkurin 005, ið spælir til dansin, og harvið er dygdin í lagi, og okkurt er til bæði ung og tilkomin, tí 005 spælir eitt sindur av hvørjum, og er bólkurin samansettur av royndum tónleikarum.

### 80 ára føðingardagur

Í dag, 20. februar, fyllir Erling Davidsen í Kvívík 80 ár. Dagurin verður hildin leygarkvøldið hjá dóttrini í Steinagerði 8 frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

21. februar verður Jens Bolstad, Sandvík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnum og barnabørnum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Berghild á Steig,** Klaksvík, fer til gravar úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Berghild kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini eina peningagávu.

**Jóhan (Jóan) Frederik Davidsen**, Kvívík, andaðist mánadagin, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jónhard Petersen**, Syðrugøta, andaðist í heiminum mikumorgunin, 56 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Herdis Joensen** úr Mykinesi andaðist týsdagin á Sýnuni í Miðvági, 93 ára gomul. Farið verður av Sýnuni fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður frá Sørvágs kirkju leygardagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, abbi og verfaðir

**Jóan Frederik Davidsen**
**Kvívík**

andaðist mánadagin 16. februar, 76 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Jóan Hendrik, Annelisa og Bjarna**

Tey, ið vilja minnast Jóan Frederik við kransi ella blómum, kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik.

## Dagurin

**20. februar. Eucharias**, deyður á 788. Biskupur í Orleans, sum fyri fleiri undurgerðir varð skírdur halgimenni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Tøkk

*Eina hjartans tøkk til tykkum á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi, sum vaktu okkum við sangi tann 16. januar 2009 á diamantbrúdleypsdegnum. Somuleiðis børn við familju, barnabørn og kenningar, ein hjartans tøkk.*

*Heilsan*
**Eleonora og Einar**